e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Aftur fingið ferð á?

*Eftir steypaósigurin leygardagin, var tað av alstórum týdningi, at neistamenninir fingu okkurt annað at hugsa um sum skjótast, og hóast stóra styrkismunin, var KÍF helst rætta liðið hjá havnarmonnunum at hitta júst nú*



*Neistamenn vóru alt annað enn nærlagdir í verjupartinum, men her hevur Karl Odmar tó fingið fatur á Jónálvi Johannesen*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

JÁKUP MØRK

KÍF-Neistin 24-34 (7-17)

Lat tað vera sagt beinanvegin. Dysturin týskvøldið millum KÍF og Neistan gjørdist ongantíð til nakað slag av spennandi undirhaldi fyri áskoðararnar. Til tess var munurin millum liðini alt ov stórur.

Ikki tí, annað var kanska ikki væntandi, tí alt árið hava liðini stríðst í hvør sínum enda av stigatalvuni, og eftir øllum sólarmerkjum at døma, verður eingin broyting hesum viðvíkjandi enn á sinni.

**Avgjørt alt fyri eitt**

Hóast leikferðin á dystinum ongantíð kom nakað serliga høgt upp, so byrjaði Neistin beinan vegin at draga frá kollfirðingunum, og eftir lítlari løtu var støðan longu 8-2.

Kollfirðingar tóku tá time-out, og eftir hetta royndu teir at nýta kyndilstaktikkin, soleiðis at bæði Heini og Áki vórðu mansvardir (Áki var annars mansvardur frá dystarbyrjan), men líka hjálpti hetta.

Neistaliðið helt á fram at skjóta mál, og í hinum endanum tók Bogi Henriksen sær av tí allar mesta.

Munurin bara øktist, og hóast Óla Kristian tók fleiri vandamiklar skotroyndir og m.a. tvey brotskøst, so kundi hann ikki á nakran hátt forða fyri, at Neistin fór til hálvleiks við eini tryggari leiðslu.

**Eingin ferð á**

Í hálvleikinum helt onkur áskoðari skemtiliga fyri, at nú kundi Neistin bara royna at verja sum frægast, og síðani nøla øll álopini, so skuldu stigini bæði helst verið heima.

Hetta var helst ikki ætlanin hjá Neistavenjaranum, Páll Poulsen, men tað sá næstan soleiðis út.

Tað syndri av ferð, sum í fyrra hálvleiki hevði verið á spælinum, var nú heilt burtur, og bæði liðini tóktust eisini bert at hava eitt fyri eyga. At avgreiða dystin sum skjótast, soleiðis at sleppast kundi undir brúsuna.

Serliga kom hetta til sjóndar á neistaliðnum, har menn als ikki vóru nærlagdir í verjupartinum, og t.d. kundu kollfirðingar tað einu ferðina skora, eftir at teir høvdu fingið tveir returbóltar á rað, uttan at nakar í neistaverjuni sá út til at leggja í tað. Fóru onkrar avleveringar við síðuna av manninum, sum tær vóru ætlaðar, var bert flent at hesum, og yvirhøvur tóktist líkasælan at valda.

**Rætta mótstøðuliðið**

Sum nevnt omanfyri, so var KÍF helst rætta liðið hjá havnarliðinum at hitta júst nú. Eftir tapið leygardagin, var ivaleyst nógv, sum skuldi fáast úr høvdinum, soleiðis at leikararnir aftur fara at hugsa positivt, nú endaspurturin er um at fara í gongd.

Har umframt var hetta eisini at kærkomið høvi til at royna onkrar álopsvariatiónir, um so er, at onkur lið hava uppdagað, hvussu Kyndil bremsaði neistaálopunum!

Hetta seinasta fingu teir so høvi til, men hóast mansverjan ikki sá út til at nerva liðið stórvegis, so er ikki víst, at tað gongur heilt so væl, tá onnur lið enn KÍF standa hinumegin miðlinjuna. Til dømis komandi vikuskifti, tá vestmenningar koma til Havnar, men tað er helst ein onnur søga.

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 5 | 4 - 0 - 1 | 497 | 393 | 104 | 19 |
| 2 | StÍF | 5 | 4 - 0 - 1 | 498 | 427 | 71 | 19 |
| 3 | Neistin | 4 | 4 - 0 - 0 | 482 | 405 | 77 | 17 |
| 4 | Kyndil | 5 | 3 - 0 - 2 | 474 | 420 | 54 | 13 |
| 5 | H71 | 5 | 1 - 0 - 4 | 406 | 482 | -76 | 4 |
| 6 | Tjaldur | 5 | 0 - 0 - 5 | 417 | 526 | -109 | 3 |
| 7 | KÍF | 5 | 1 - 0 - 4 | 375 | 496 | -121 | 3 |

**Dysturin í tølum**

**Málskjúttar:**

KÍF: Vagnur Johannesen 7, Jákup Dam 6, Petur Martin Johansen 5 (3), Petur Martin Poulsen 4, Finn Heri Johannesen 2 (1)

Neistin: Heini Joensen 8 (1), Áki Olsen 7 (4), Finnur Hansson 6, Elmar Ósá 5, Kári Mortensen 3, Karl Oddmar Rasmussen 3, Jákup Sverri Kass 1, Helgi Justinussen 1

**Brotskøst:**

KÍF 5, Neistin 8

Útvísingar:

KÍF 5, Neistin 3

**Dómarar úr StÍF:**

Pole Hansen og Alexandur Johansen

# Væl eydnað dartkapping

*Sunnudagin var dartkapping hildin í Club 20, og gjørdist endaliga úrslitið, at Petur Grønagarð fór avstað við steypinum fyri fyrsta plássið*

JÁKUP MØRK

Sunnudagin skipaði Club 20 fyri dartkapping í hølum felagsins, og frá fyriskiparunum frætta vit, undirtøkan var sera góð.

Ikki færri enn 32 luttakarar høvdu boðað frá luttøku, og fyri at minka eitt sindur um talið, vórðu hesir fyrst býttir í fýra bólkar, har seks teir fremstu komu víðari.

Hesir vórðu so aftur býttir í fýra bólkar, og eftir hetta sluppu teir báðir fremstu í hvørjum bólkinum at fram í sonevnda cup-skipanini..

**Petur vann**

Eftir at seinastu 16 leikararnir sostatt høvdu stríðst við at sláa hvønn annan úr kappingini, endaði alt við, at Petur Grønagarð úr Argja Dartfelag stóð við vinnarasteypinum, eftir at hann í finaludystinum hevði bast Peturi Thomsen úr dartfelagnum, Strálan.

Á einum samlaðum triðja plássi vóru Henrik Pedersen og Alvin Egholm úr ávíkavist Havnar Dartfelag og HR-Dart.

Eisini vórðu vinningar latnir til leikararnar, sum høvdu hægsta útgangin á einum spæli og sum megnaðu at kasta fægst pílar fyri at vinna eitt spæl. Hægsta útgangin hevði Petur Grønagarð, sum nýtti tríggjar ørvar til at broyta 142 til 0, meðan Henrik Pedersen ta einu ferðina einans nýtti 13 ørvar til at enda eitt spæl.

Eftir kappingina lat Føroya Bjór steyp og vinningar til teir fýra omanfyrinevndu, og fyrireikararnir kundu líta aftur á eitt sera væl eydnað tiltak.

Eingin ivi er um, at hetta tiltakið verður roynt aftur komandi ár, vóru boðini úr Club 20.

**Rætting**

Annars nevndu vit í fríggjadagsblaðnum, at hetta varð seinasta dartkappingin í hesum kappingarárinum.

Vit hava síðani frætt, at okkara upplýsingar ikki vóru rættar, og tað komandi tíðina verða hildnar fimm opnar kappingar, umframt eitt umfar í liðkappingini og sjálvandi FM-fyri einstaklingar.



*Glaðir vinnarar saman við vinningum sínum*

# Sophus venur nú bæði

*Sophus Dahl Christiansen venur nú bæði mans- og kvinnudeildina hjá Kyndli*

JÁKUP MØRK

Siðani Flemming Raben fyrr í ár varð settur frá sum venjari hjá kyndilskvinnunum, hevur tað verið Bárður Johannesen, sum hevur staðið við stýrisvølin.

Orsøkin til, at Bárður nú gevst í hesum sessi at, at hann um summarið er málverji á besta mansliðnum hjá HB, og tískil ikki hevur stundir til hondbóltin, nú fótbóltsvenjingin aftur er byrjarð.

Hetta hava báðir partar tó verið fullgreiðir yvir alla tíðina, og hevur hetta tíksil bert verið roknað sum ein fyribils loysn.

Loysnin fyri restina av kappingarárinum er nú funnin, og er hon, at Sophus Dahl Christiansen, sum í ár venur besta mansliðið hjá Kyndli, eisini skal taka sær av kvinnuliðnum, hetta til kappingarársenda.

Sophus hevur annars vant kvinnurnar hjá Kyndli seinastu trý kappingarárini, har tað m.a. er vorðið til tvey FM-heitið. Sjálvur heldur Sophus eisini, at hetta er hin mest náttúrliga loysnin, tí hann kennir so at siga allar leikararnar, og at tveir mánaðir hevði verið alt ov stutt tíð hjá einum møguligum nýggjum venjara. Serliga um hesin ikki var væl kendur við leikarahópin frammanundan.



ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

DANNY TRANSPORT
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 319192

FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT
SAFARI TRANSPORT
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tlf. 32 22 22

KONSERT
VIÐ CREAMY OG KULAR RØTUR
Í ÍTRÓTTARHØLLINI Á HÁLSI
leygardagin 19. februar kl. 17.00
Seld eru 1.600 atgongumerkir
Atgongumerkir fáast í flest øllum Statoilstøðum kring landið og á Kunningarstovuni í Tórshavn
Restorffs · STATOIL · KiMs · Atlantic Airways · FØROYA SPARIKASSI
Sosialurin - 311820

www.wenzel.fo

KEYP SUMMARDEKKINI NÚ



4 stk. alufelgur 7x15" 4x100
4 dekk 195.50x15
Prísur 5.900.-
Kunnu nýtast til t.d. Toyota, Opel, VW og aðrar.
BBR-Service
620 Runavík • Tel. 44 91 11
Sosialurin - 311820

ES
P/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29
E-mail: es@es.fo

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

Føroya størsta úrval av PAKKITILFARI
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir
Vit útvega eisini:
* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til ídnaðin
* Reingerðisevnir
* Tilsetningsevnir
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari
...sjálvandi til besta prísin!!
FARPACK
Staravegur 5, P.O. Box 171
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 35 30 00
Fax +298 35 30 10
E-mail: farpack@farpack.com

# Deildarstjórar
## í Vinnumálastýrinum

Sum liður í skipanini av bygnaðinum í Vinnumálastýrinum verða hervið tvey deildarstjórastørv til ávikavist aðalskrivstovuna og samskiftisdeildina lýst leys til setan eftir nærri avtalu. Talan er um endaliga setan av fyribils størvum.

**Aðalskrivstovan**

Aðalskrivstovan er skrivstova Vinnumálastýrisins og tekur sær av tvørgangandi uppgávum í Vinnumálastýrinum.

**Deildarstjórin á aðalskrivstovuni hevur m.a. hesar uppgávur**

- Ábyrgd av dagligu leiðsluni á deildini, herundir roknskaparhald og starvsfólkamál Vinnumálastýrisins
- Veita búskaparfrøðiliga ráðgeving til deildir og stovnar í stýrinum
- Góðkenna fíggjarætlanir og átekna játtanarroknskapir hjá stovnum
- Taka fyrisitingaravgerðir innan málsøkini
- At vera limur í leiðslubólkinum fyri Vinnumálastýrið
- Aðrar fyri starvið viðkomandi uppgávur

**Samskiftisdeildin**

Samskiftisdeildin stendur fyri at samskipa virksemið hjá landsstýrinum á samskiftis- og samferðsluøkinum. Ein høvuðsuppgáva er at lýsa teir karmar, sum tann almenna infraskipanin skapar fyri vinnulívið.

**Deildarstjórin á samskiftisdeildini hevur hesar uppgávur**

- Ábyrgd av dagligu leiðsluni á deildini
- Veita ráðgeving til stovnar
- Ábyrgd av lógararbeiðinum á deildini
- Taka fyrisitingaravgerðir innan málsøkini
- At vera limur í leiðslubólkinum í Vinnumálastýrinum
- Aðrar fyri starvið viðkomandi uppgávur

**Førleikakrøv**

Vit vænta okkum av umsøkjarunum, at tey m.a. hava:

- Hægri útbúgving innan løgfrøði, búskaparfrøði, um siting e.l.
- Royndir á økinum ella sum heild innan almenna og/ella privata fyrisiting
- Góð samstarvsevnir, umframt mennandi leiðslustíl

**Vit kunnu bjóða**

Talan er um spennandi størv. Deildarstjórarnir vera við til at skapa karmarnar á hesum umsitingarligu økjunum, sum hava stóran týdning fyri samlaða stýrið.

**Løn og setanartreytir**

Setanin umfatar Vinnumálastýrið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri. Størvini eru flokkað í 36. lønarflokki sum tænastumenn, uttan at tað tó er talan um tænastumannastørv. Endalig avgerð um lønarstig fer fram eftir samráðing við avvarðandi yrkisfelag.

Møguleiki er fyri, at starvsøkini verða víðkað/broytt, og mugu tey, sum sett verða, tola hetta.

**Umsóknir**

Umsókn við avriti av prógvum, C.V. o.ø. skulu sendast til:

**Vinnumálastýrið**
**Postrúm 377**
**110 Tórshavn**

Umsóknarfreist: 27. februar 2000

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Arna Poulsen, tlf. 356060.

Reyði krossur Føroya
Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. $17^{00}$ til $23^{00}$
212380